# Viðtøkur

*fyri*

# Vestmanna Bygdasavn.

Grein 1.

Vestmanna Bygdasavn er ein sjálveigandi stovnur undir eftirlitið av landsantikvarinum.

Grein2.

Endamál savnsins er innan Vestmanna Kommunu:

Stk. 1. At vekja ans fyri fornminnum, bygningum og umhvørvi, sum hava antikvariskan, siðsøguligan og mentunarligan týdning.

Stk. 2. At savna, skráseta, varðveita og framsýna gripir, sum hava siðsøguligan áhuga, at savna frásagnir um nýtslu og søgu teirra og at skráseta, varðveita og umsita føst fornminni.

Stk. 3. Í varðveitingararbeiðinum at útvega fastar ognir og umsita tær.

Stk. 4. At stuðla innsavningarvirksemi av lutum, sum hava tilknýti til bygdina.

Grein 3.

Stk. 1. Savnið verður stýrt av eini 5 mannanevnd, har 3 limir verða valdir av Vestmanna Fornminnisfelag og 2 limir av Vestmanna Bygdaráð.

Stk. 2. Annaðhvørt ár fara tveir nevndarlimir frá, 1. og 2. ferð við lutakastið, ein sum Vestmanna Forngripafelag velur og ein sum Vestmanna Bygdaráð velur. Nevndarlimur kann veljast aftur.
Tá kommunuval hevur verið, kann bygdaráðið velja aðrar limir í staðin fyri verandi.

Stk. 3. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, næstformanni og kassameistara. Kallað verður til fundar við 14 daga freist.

Stk. 4. Nevndin hevur ábyrgdina av rakstrinum og hvussu inntøkurnar verða nýttar.

Stk. 5. Nevndin stendur Vestmanna Fornminnisfelag og Vestmanna Kommunu til svars fyri ognum og rakstri savnsins.

Stk. 6. Nevndaravgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.

Stk. 7. Til keyp, sølu og veðseting av fastogn krevst at minst 4 av 5 nevndarlimum atkvøða fyri.

Stk. 8. Allar nevndarviðgerðir verða skrivaðar í fundarbók hjá Vestmanna Bygdasavn og allir teir nevndarlimir, sum eru

á fundi, skriva undir.

Grein 4.

Stk. 1. Savnið kann seta savnsleiðara, sum við hjálp og leiðbeining frá landsantikvarinum og undir eftirlitið hansara tekur sær av viðurskiftum savnsins.

Stk. 2. Samsýning til savnsleiðara og møgulig hjálparfólk verður ásett av nevndini.

Grein 5.

Stk. 1. Virksemi savnsins verður fíggjað av Stuðulsfelagnum Vestmanna Fornminnisfelag og studningi úr Landskassanum samb. LL nr. 17 frá 9. mei 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi og møguligum stuðli frá Vestmanna Kommunu.

Grein 6.

Stk. 1. Fíggjarárið er álmanakkaárið.

Stk. 2. Í seinasta lagi 1. apríl eftir at fíggjarárið er lokið, leggur nevndin grannskoðaðan rokniskap fyri farna rokniskaparskeið til góðkenningar.

Stk. 3. Grannskoðaði rokniskapurin skal góðkennast av Vestmanna Fornminnisfelag og Vestmanna Bygdaráð.

Stk. 4. Uppskot til rakstrarætlan fyri komandi fíggjarár skal góðkennast av Vestmanna Forngripafelag og Vestmanna Bygdaráð innan 1. apríl.

Grein 7.

Stk. 1. Verður sjálveigandi stovnurin Vestmanna Bygdasavn avtikin tilfalla allar ognir stovnsins Vestmanna Kommunu.

Grein 8.

Stk. 1. Í øllum førum verður farið fram eftir tí, sum er fyrisett í LL nr. 17 frá 9. mei 1972 um bygdasøvn við mentunarsøguligum virksemi.

*Vestmanna hin 26 okt 1994*

*Vegna nevndini:* *Finnbogi Joensen*

Finnbogi Joensen

*Hans Petersen*
Hans Petersen

Bjørn á Heygum

Hjørleif Heinesen

Maria Vilhelm
*Maria Vilhelm*